# BØNARLØTAN

**OKTOBER** **2025** **40. árg.**

***1. Mikudagur*** ***1. Kong. 17.1-24***



**ZAREPTA**

4. okt. verður hátíðarhald í Zarepta, nú 60 ár eru liðin, síðan Elsa og Brynleif Hansen byrjaðu leguarbeiðið við Áir. Máltíð verður kl. 10. Á skránni verður síðani: Samrøða við Elsu og Poul Jóhan Djurhuus um fyrstu árini; Símun Pætur á Torkilsheyggi sigur frá byggisøguni; Agnar Josephsen og Birgir Andreasen hugleiða um framtíðarætlanir; John Færø leiðir sangløtu við vitnisburði frá fólki, ið er komið til trúgv í Zarepta; bønar- og takkarløta; enda kl. 14. Heystlega 15-17 ár 10.-15. okt.

**KRINGVARPIÐ**

5. okt. útvarpsmøti, Kristnastova

26. okt. sjónvarpsmøti, Nerija, Skála

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21: Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21: Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Hósdagur* — *Sálm. 67.1-68.12*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Vit eru á trúboðaraskúlanum í Missouri til 4. okt. Saman við ungum fólki eggja vit øðrum ungum, sum vilja tæna Harranum kring heimin. Um 3 vikur seinni skal eg fáa strálur í 5½ viku fyri krabba. Biðið um vísdóm, og at viðgerðin gongur væl.

**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygard. 4. okt. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsg. 2B í Aalborg. Biðið fyri møtinum.

## *3. Fríggjadagur* — *1. Kor. 15.1-19*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Mánaðarliga føroyska møtið verður 3. okt. kl. 19.30. Vit savnast í Rosenlunden 15, miðskeiðis í Odense.

*Í dag fyllir Nana Mortensen 14 ár

## *4. Leygardagur* — *1. Kong. 18.1-21*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Eg verði í Føroyum 4.-17. okt. Nú er klárt at gera upptøkur til TeknBíbliuna, sum Jens Pauli í Dali hevur arbeitt við seinastu tíðina. Eg vitji fegin samkomur at greiða nærri frá arbeiðnum.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 5**

## *5. Sunnudagur* — *1. Kor. 15.20-38*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 11, Rio 6**
5.-21. okt. skal Hallur til Myanmar at undirvísa á MEGST Bíbliuskúlanum. Trygdarstøðan í landinum er óstøðug. Biðið, at alt skal ganga væl, fyri undirvísingini og næmingunum. Minnist eisini Shino og børnini, ið verða eftir í Japan.

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Eg fari avstað aftur úr Føroyum nú í okt. Eg vitji familju í Danmark, áðrenn leiðin gongur aftur til Senegal fyrst í nov.

**Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar**
**Andrias Hansen, trúboðaraflogskipari við MAF**
Eg arbeiði enn sum floglærari.

## 6. Mánadagur 1. Kong. 18.22-46



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 16, Markus 13, Evita 10, Joy 8**

Í tvær vikur hava vit vitjan av *lærisveinabólkum* – ung úr ymsum systursamkomum. Aðru vikuna koma fimm ungir menn, og hina vikuna fimm ungar kvinnur. Martin undirvísir, og vit hava ymiskt á skránni. Biðið, at Harrin signar.

## 7. Týsdagur 1. Kor. 15.39-58

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**



Vit verða verandi í Ukraina til 14. okt. Síðan halda vit fram til Póllands og Svøríkis, har vit vitja trúboðarar. Síðst í okt. fara vit til leiðarafundir í Spania. So verða vit í Føroyum tað mesta av nov.

*Í dag fyllir Jónathan Tuohy 16 ár

## 8. Mikudagur 1. Kong. 19.1-21

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Møtir, framløgur og samtalur liggja fyri framman. Í Pakistan er torført at savna fólk til møtir, tí stór øki liggja undir í vatni. Sára, systir Shamilu, er partur av einum stórum verki har. Biðið, at

Harrin styrkir og signar, og biðið fyri Sáru og teimum mongu, ið koma til trúgv.

## *9. Hósdagur* *Sálm. 68.13-36*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



9.-17. okt. eru vit í Kuala Lumpur, Malaisia, har vit vitja góðar vinir, og eg tali í eini samkomu. Vit vilja stuðla og eggja hjúnunum, ið umboða NTM har í landinum. Ofta er tungt at vera trúgvandi í fremmandari mentan. 17. okt. til 2. nov. eru vit í Tailandi. Eg skal luttaka á leiðslufundum umframt tala á árligu samfelagsstevnuni, har fleiri grannalond eisini luttaka. Vit vilja vera trúboðarum til signing og eggjan. Biðið fyri møtunum og fyri fyrireikingunum. Vit hava tað gott.



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

## *10. Fríggjadagur* *1. Kor. 16.1-24*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**



Vit bjóða til móttøku í nýggja samkomubygninginum 11. okt. Biðið, at Gud dregur nógv fólk til sín, nú samkoman flytur inn í býin.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 10, Natan 7**

## *11. Leygardagur* *1. Kong. 20.1-25*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Bøn okkara fyri samkomuni er, at tað má eyðkenna hana, sum stendur skrivað: *Stevn eftir rættvísi, gudsótta, trúgv, kærleika, toli, spakføri! Stríð hitt góða stríð trúarinnar* ... 1. Tim 6.11-12.

## *12. Sunnudagur* *Heb. 11.20-40*



**ONGLAND,**
**Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**
Biðið, at 20 trúboðarar á venjingarskeiði menna grundstøði og fatan sína av Gudi. Biðið eisini fyri mær, Claire, og hinum vegleiðaranum, at vit eru trúgv í læruni og fáa gott samband við hinar luttakararnar, hóast tað er á netinum. Eg havi átikið mær at vera ábyrgdarfólk hjá einum evropeiskum trúboðarabólki, ið umboðar yvir 50 felagsskapir.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

## *13. Mánadagur* *1. Kong. 20.26-43*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Í 2017 kom ein 11 ára gomul genta av bygd á legu. Hon játtaði, at hon kom til trúgv á Jesus. Vit mistu sambandið við hana, tí foreldrini fluttu, og hon endaði í Danmark. Hon er nú komin til Qaqortoq at ganga í studentaskúla. Hon leitaði okkum upp, og vit eru farin at hava bíbliutíma. Biðið fyri henni og øðrum, sum hava hoyrt boðskapin, at sáðið ikki verður køvt, men búnast og ber ávøkst.

## GRØNLAND
### Juvel II
### Gull-Britt og Karsten Hansen

Juvel II fór av Klaksvík til Grønlands 21. mai. Higartil hevur Harrin hjálpt. Á ferðini heim aftur úr Ittoqqortoormiit vóru: Thorvald Gaardlykke, Argir; Cecilia Maria Sivertsen, Klaksvík; Ruth Gaardlykke, Argir; Karsten Hansen, Klaksvík; Dániel Jacobsen, Norðragøta; Gullak Gullaksen, Leirvík; Silas Jacobsen, Klaksvík; Ludvík Pedersen, Tórshavn; Ró á Lakjuni Simonsen, Klaksvík.



## *14. Týsdagur* *Heb. 12.1-11*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 3**

Regluligu møtini í Kristnastovu eru fríggjakv. kl. 20 og sunnud. kl. 11. Húsbólkar aðruhvørja viku og bønarmøti eina ferð um mánaðin. Vit hava nú eisini kvinnumøti eina ferð um mánaðin. Kristnastovulegan verður á Nordsjællands Efterskole 16.-19. okt. Ingvard Petersen fer at hava bíbliuundirvísing.



**– Susan og Øssur Berghamar**

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Mikudagur* *1. Kong. 21.1-29*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Skúlaárið á North Cotes er nú byrjað. Carol og eg undirvísa á hesum skeiðnum á fyrsta sinni. Biðið, at skúlagongdin verður næmingunum til uppbygging. Miðskeiðis í okt. fara vit á ráðstevnu í Norðurírlandi. Biðið, at fleiri fólk vilja virka fyri Harran.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**

**FØROYAR**

– Elin og Jógvan Jacobsen
– Unn og Jógvan Zachariassen
– Lis Zachariassen
– Annika og Poul Færø
– Anna og Óli Steinberg
– Maria og Jens Bech



## *16. Hósdagur* — *Sálm. 69*

**FØROYAR**
**Atlantic Mission**

Nevndin í Atlantic Mission er broytt: Svenning av Lofti, Jógvan Páll Sevdal, Páll á Lakjuni og Poul Johan Djurhuus, ið hava verið við frá byrjan í 2011, eru farnir úr nevndini, men halda fram sum stuðulsnevnd. Ruth Gaardlykke og Ólavur Thomsen eru nú leiðsla í Atlantic Mission.



**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *17. Fríggjadagur* — *Heb. 12.12-29*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Vit takka Gudi fyri okkara nýggju samkomuhølir, tey 100 børnini, ið vóru á legu, og at enn fleiri leggjast aftrat samkomuni. Vit

fyrireika næstu mánaðirnar og hyggja við undran at øllum, sum Harrin virkar.

## *18. Leygardagur* *1. Kong. 22.1-28*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**
Biðið um regn. Vit eru bundin av vatni í húsinum. Biðið, at Gud sendir okkum starvsfelagar, at vit hava eyguni vend á Kristus og hava áræði.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**

## *19. Sunnudagur* *Heb. 13.1-25*

**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**
Biðið fyri turkum í Evropa. Reglulig *street outreach* eru í Berlin, og turkar koma til trúgv har. Minnist allar okkara kenningar í Turkalandi. Vit eru takksom, at fólk regluliga koma til trúgv gjøgnum bíbliubrævskeiðið.



*Í dag fyllir Ester Mikkelsen 15 ár

## *20. Mánadagur* *1. Kong. 22.29-54*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 1, Salome 1**

Vit bæði hava klárað seinastu royndina í kovolmálinum. Vit skulu nú læra meir um, hvussu málið virkar, so at vit kunnu fara at týða bøkur og seinni at týða Orð Guðs til kovolmálið.

*Í dag fyllir Abigail Mortensen 7 ár
*Í dag fyllir Debora Christiansen 10 ár

## *21. Týsdagur* *Jónas 1.1-16*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Barnatænastan í grannalagnum byrjaði í sept. Biðið fyri børnunum og foreldrum teirra. Vit leita eftir samkomuhølum, nú samkoman alsamt veksur. Fýra kvinnulig flóttafólk úr aðrari mentan koma til bíbliuundirvísing her hjá okkum. Biðið, at tær skilja gleðiboðskapin.

## *22. Mikudagur* *2. Kor. 1.1-24*

**OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

Hetta er triðja toymið, vit hava verið leiðarar hjá. Toymini hava hildið á við verandi bíbliubólki og byrjað nýggjar í Mamelodi,

m.a. millum rúsevnismisnýtarar. Biðið fyri bólkunum, at Orð Harrans nemur hjørtuni, og at menniskju verða broytt.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

*Í dag fyllir Sarah Mortensen 15 ár

## *23. Hósdagur* *Sálm. 70 og 71*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Mixtectoymið og eg gera Rómbr. klárt til umsetingarráðgeva at endurskoða. Hann kannar, um nakað vantar, og um týðingin samsvarar við grikska tekstin. Ráðgevin arbeiðir við orðarættari týðing úr mixtec til spanskt, tí hann dugir ikki mixtec. Toymið fer síðan at svara spurningum, sum hann hevur.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. Fríggjadagur* *Jónas 2.1-11*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12,**
**Judah 10, Ethan 8**



Orð Guds hevur møtt mótstøðu í bygdini Savena, men seinastu vikurnar eru tey farin at spyrja eftir tí. Tey

hava eisini bygt eini hús til bíbliulærararnar, tá teir vitja. Biðið fyri hesum møguleikanum og fyri Orði Guds, sum kann bróta myrkrið har. Vit laga okkum til lívið í frumskógini eftir 2,5 ár burtur. Biðið fyri okkum og fyri børnum okkara, ið eru á kostskúla, og sum vit bert síggja tvær vikur annanhvønn mánað.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

*Í dag fyllir Natan Christiansen 7 ár

## *25. Leygardagur* *2. Kor. 2.1-17*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**



Hjartans tøkk, at tit biðja fyri Ástjørn og stuðla. Umleið 150 børn og ung komu í summar og hoyrdu Guds Orð. Biðið serliga fyri teimum, sum søgdu seg vilja fylgja Jesusi.

## *26. Sunnudagur* *Jónas 3.1-10*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**



Sana, trúgvandi maðurin í Tarensa, sum fekk akkumulatorsýru í eyguni herfyri, luttók á bíbliuskeiði seinasta mánað.

Trúgvandi vóru úr fleiri ymiskum ættarbólkum, og Sana gleddist um samfelagið. Um 30.000 í Dakar liva á gøtuni. Marion og eg hjálpa eina ferð um vikuna í arbeiði, har einir 30 dreingir koma. Teir læra franskt, rokning, smíð og hoyra Guds Orð. Nakrir eru byrjaðir at koma til møtir. Biðið, at teir koma til trúgv.

## *27. Mánadagur* *2. Kor. 3.1-18*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Takk fyri forbønir. Nógv tiltøk byrja aftur í heysti. Nýggj fólk leggjast alsamt aftrat samkomuni. Minnist tey, sum skipa fyri, og biðið um vísdóm og leiðslu.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Vit eru takksom fyri tíðina í Føroyum, tá vit vitjaðu vinfólk og samkomur. Vit vóna at koma væl heim aftur, nú politiska støðan í landinum aftur er óstøðug.

## *28. Týsdagur* *Jónas 4.1-11*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Tilfarið til evangelisering er aftur endurskoðað, og ætlanin er at vitja fleiri samkomur og læra tey at brúka hetta.
Eisini tilfarið um Rómbr. er nærum liðugt, og skjótt verður klárt at lata samkomuleiðarum hetta, so teir kunnu læra tað í samkomunum. GT-umsetingin gongur skjótt framá. Tað er sera spennandi, at 200.000 kankanaeyfólk loksins fáa alla Bíbliuna á sínum egna máli. Vit eru ikki heilt ung longur, og heilsan fer at

bila. Hjartans tráan okkara er tó at halda fram, so leingi orka er til tað. Biðið fyri arbeiði okkara og um heilsu og styrki.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

## *29. Mikudagur* — *2. Kor. 4.1-18*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**
Í okkara toymi hevur eitt starvsfólk júst fingið krabbameinsviðgerð. Onnur hava verið til kanningar og fingið viðgerð, tí illgruni var um krabbamein og aðrar álvarsamar sjúkur. Biðið saman við okkum um grøðing, styrki og troyst til hvønn einstakan teirra.

## *30. Hósdagur* — *Sálm. 72*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
Birna og Poul Johannes Joensen hava síðan í juli verið í Gushegu í Norðurghana saman við børnunum Gunnhild, Ásu og Kristoffur.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705



©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

Tey hava tænt í Queen of Sheba verkætlanini, sum m.a. fevnir um at byggja nýggja føði- og barnaklinikk og veita mammum og børnum heilsuhjálp, at útbúgva heilsustarvsfólk og at evangelisera millum tey lokalu. Poul Johannes er handverkari og hjálpti serliga við praktiskum byggiarbeiði, og Birna, sum er sjúkrarøktarfrøðingur, hjálpti til við sárreinsan o.ø. hjá sjúklingum. Saman við børnunum pakka tey pinkubarnaklæði o.a. til mammurnar, ið koma inn á klinikkina. Tíðin fer eisini til spæl saman við teimum lokalu.

## *31. Fríggjadagur* — *Obadias 1-21*

### Veritas Forum

Spurningar og svar við John Lennox í Hoydølum 31. okt. 2014. KFS Føroyar skipaði fyri, og 250 næmingar savnaðust at hoyra kenda professaran úr Oxford og seta spurningar um Gud, Bíbliuna, vísindi, trúgv og mangt annað.

youtu.be/JH7HlfaXFuk?si=mrmnLftoGJS9zEQz (90 min.)



### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo